# Hvar lesa føroyingar?

**Alt fleiri føroyingar fara undir hægri lestur. Danmark er enn toppskorarin, sum dregur flestar vitanartystar føroyingar at sær, men talið av lesandi her heima er eisini vaksið nógv. Tað vísa tøl frá Stuðulsstovninum**

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

Sum heild vísa tølini, at alt fleiri føroyingar fara undir hægri lesnað. Síðani 2004 og fram til 2009 eru tølini støðugt vaksin, og seinasta ár var aftur met sett. Tá var talið av lesandi føroyingum komið upp á 1785, eitt rættiliga stórt lop frá 2007/08, tá talið var 1547.

### Føroyar

Talið av lesandi í Føroyum hevur verið nøkulunda javnt fram til skúlaárið 2008, tá talið øktiskt við fleiri enn 100 lesandi. Orsøkin til hetta stóra lopið kann vera, at læraraskúlin umskipaði lærara- og pedagogútbúgvingina til bachelor, og tóku tískil fleiri næmingar inn. Hetta sama árið bjóðaði Fróðskaparsetrið eisini onkrar nýggjar útbúgvingar, sum drógu fleiri umsøkjarar.

### Danmark

Tað er meiri ivasamt, hví talið av føroyingum, sum fóru til Danmarkar at lesa, hækkaði so nógv í 2008. Eisini her hækkaði talið við nærum 100 fólkum. Tað kann hugsast, at kreppan var farin at gera vart við seg, og fólk søktu inn á skúla, tí verri var at fáa arbeiði. Eisini nýggja bonusreglan, sum loyvir nýklaktum studentum at falda miðaltalið við 1,08, um søkt varð víðari innan tvey ár eftir miðnám, kann hava fingið fleiri av skunda sær víðari undir hægri lesnað. Eisini kann talan vera um ein serliga stóran árgang. Mest sannlíkt er, at tað er ein blandingur av øllum hesum tingunum.

### Stórabretland

Talið av lesandi í Stórabretlandi er eisini hækkað munandi; tað er nærum tvífaldað frá 2007 til 2008. Tað er væl trúligt, at tað er boðskapurin um ÚSUN stuðulin, sum byrjar at sláa ígjøgnum her, og fólk skilja, at tey hava møguleika at fara til Bretlands at útbúgva seg. Nøkur hava verið í Stórabretlandi árini frammanundan, og tað kann tykjast, sum at ringarnir av hesum eru við at breiða seg.

### Norðurlond annars

Tað tykist ikki, sum Noreg, Svøríki, Finnland og Ísland eru serliga vælumtókt, sum lestarlond hjá føroyingum. Talið av lesandi í hesum londum hevur verið ógvuliga støðugt øll árini, og tá man hugsar um, at samlaða talið av lesandi er hækkað, er prosentparturin av lesandi í Norðurlondum annars, minkaður.

### Norðuramerika

Talið av føroyingum í Norðuramerika nærum tvífaldaðist frá 2007 til 2008, úr 8 føroyingum upp í 15. Tað er væl hugsandi, at tað aftur her er ÚSUN stuðulin, ið spælir inn, tí tað er annars ógvuliga kostnaðarmikið at lesa í USA. Tað er tó ógvuliga sannlíkt, at hetta talið fer at minka aftur, nú ÚSUN stuðulin er minkaður, og fólk sjálvi mugu rinda ein stóran part av dýra skúlagjaldinum.



**Føroyingar á hægri útbúgvingum - býtt á landafrøðilig øki og skúlaár**

| Talva 1 | 2004/05 | | 2005/06 | | 2006/07 | | 2007/08 | | 2008/09 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið |
| Føroyar | 576 | 39.0% | 596 | 39.5% | 598 | 39.3% | 605 | 39.1% | 701 | 39.3% |
| Danmark | 787 | 53.3% | 789 | 52.3% | 774 | 50.9% | 791 | 51.1% | 897 | 50.3% |
| Norðurlond annars | 32 | 2.2% | 28 | 1.9% | 27 | 1.8% | 37 | 2.4% | 34 | 1.9% |
| Stórabretland | 61 | 4.1% | 77 | 5.1% | 94 | 6.2% | 94 | 6.1% | 121 | 6.8% |
| Europa annars | 7 | 0.5% | 5 | 0.3% | 7 | 0.5% | 8 | 0.5% | 10 | 0.6% |
| Norðuramerika | 9 | 0.6% | 7 | 0.5% | 11 | 0.7% | 8 | 0.5% | 15 | 0.8% |
| Suðuramerika | 1 | 0.1% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% |
| Australia/New Z | 4 | 0.3% | 5 | 0.3% | 8 | 0.5% | 4 | 0.3% | 7 | 0.4% |
| Miðeystur | 0 | 0.0% | 2 | 0.1% | 1 | 0.1% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% |
| Asia | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% | 0 | 0.0% |
| Í alt | 1477 | 100.0% | 1509 | 100.0% | 1520 | 100.0% | 1547 | 100.0% | 1785 | 100.0% |

Tølini fyri lesandi í Føroyum eru gjørd við støði í mánaðarliga lestarstuðulinum - øll á hægri útbúgvingum, ið hava fingið stuðulin í skúlaárinum, eru tald við. Tølini fyri lesandi uttanlands eru gjørd við støði í ferðastuðulinum - øll á hægri útbúgvingum, ið hava fingið stuðulin í skúlaárinum, eru tald við.

*Kelda: Stuðulsstovnurin*